# Vit lata okkara tilfeingi av hondum

OLGA BISKOPSTØ
løgtingskvinna



Eitt felag hjá Nordisk Film heitir á allar føroyingar um at lata teimum filmbrot, ið fólk liggja inni við. Endamálið er at lýsa tey seinastu 100 árini av Føroya søgu - í filmi. Eitt gott og áhugavert tiltak.

Men hvar eru vit føroyingar og tey, sum skulu varða av okkara mentan og søgu, okkara fornminnum og okkara samleika? Hví sita vit í Føroyum "altíð" og bíða, til onnur taka sær um reiggj at brúka okkara tilfeingi? Vit hava sæð tað í ílegugranskingini, og nú síggja vit okkara mentanararv og søgu fara til fremmant land at tulka og arbeiða við.

Filmmiðilin er ein spennandi og týdningarmikil miðil, bæði til undirhald og lærdóm, og vit føroyingar hava síðan byrjan verið eins hugtikin og onnur av hesum fantastiska møguleika: at lata okkum føra inn í ævintýr og kunnandi frásagnir. Styrkirnar, ið filmmiðilin hevur, eru fram um aðrar miðlar at hugfanga og evna okkara tilvitan, og tí er tað eisini ein miðil, vit skulu fyrihalda okkum kritiskt til og læra okkum at brúka.

Føroyar hava eins og onnur lond eina ótømandi keldu av tilfari, tað veri seg innan mentan og samtíð, ið kann nýtast í filmi. Vit hava listafólk, ungdómar og fróðarfólk, ið øll uttan iva rúma hópin av tilfeingi til filmmiðilin, men í Føroyum eru stórt sæð ongar umstøður ella møguleikar at gera nakað við hetta tilfeingi.

Hví føroyska samfelagið og politiska skipan okkara ongantíð hevur stuðlað undir ella sæð tørvin og møguleikan í at uppala, at eggja til og at seta í verk møguleikan at brúka filmmiðilin, er ilt at siga. Eg loyvi mær at gita meg til tríggjar orsakir. Ein er fíggjarlig, tí hesin miðil ber orð fyri at vera kostnaðartungur. Sum tað næsta er hetta ein miðil, ið ikki hevur verið mettur sum "stovureinur" sæð í mun til okkara mentan, eins og føroyski dansurin og onnur mentan ikki hevur verið mett sum hóskandi, og sum tað triðja kann talan vera um undirskot av tjóðarkenslu ella samleikafatan. Her kunnu vit nevna dømi um, at vit í sera lítlan mun í skúla og mentan hava brúkt orku uppá at arbeiða við okkara egnu søgu og samtíð, at vit í sera lítlan mun hava brúkt pening og orku uppá at skráseta og verja okkara fornminni og mentanararv, og sum heild - eisini í dag - brúka lítla orku uppá at skapa kunning og innlit í okkara egna samfelag.

Í Føroyum hava vit tørv á einum Filmskúla. Hesin filmskúli kann gerast partur av Listaskúlanum, ið verður bygdur í næstu framtíð. Vit skulu leggja orku í at fáa henda miðil á føtur so skjótt, sum til ber, saktans í samstarvi við filmskúlar í okkara grannalondum. Stundin er komin, at vit, eins og øll onnur framkomin lond, kunnu bjóða ungdóminum møguleikan at brúka henda fantastiska hugfangandi miðilin, eins og vit kunnu brúka hann í okkara tjóðarbygging.

# Viðmerkingar til samgonguskjalið

JARVIN F. HANSEN
Vegna Føroya Pedagogfelag



Føroya Pedagogfelag fegnast um at nýggja samgongan nú raðfestir, at fara undir eina nýggja sosiallóggáva og at rættartrygdin hjá menningartarnaðum, sálarsjúkum, brekaðum, brúkarum, sjúklingum, gomlum, børnum og ungum verður styrkt.

Eisini fegnast vit um, at farast skal undir ein sosialpolitiskan reform, har ið Almannaskipanirnar skulu háttast soleiðis, at fólk mest møguliga kunnu verða virkin í samfelagnum og at ein nýggj føroysk forsorgarlóg, sum eisini fremur rættartrygd og gjøgnumskygni, verður smíðað. Somuleiðis er ætlanin at eitt vælferðarráð verður skipað – hetta halda vit er hóskandi til eitt nútíðarsamfelag. Tað hevur altíð týdning, at hesar skipanir verða eftirmettir og tillagaðar nútíðarsamfelagnum.

Sum heild eru vit nøgd við ætlanirnar um at bøta umstøðurnar á sernámsfrøðiliga økinum.

Hóast felagið metir tað verða gott at dagstovnaøkið verður lagt undir Mentamálaráðið at umsita,

fyri at kunna skapa eitt betri heildartilboð til børn í og undir skúlaaldri, er tað undrunarvert, at tað ikki eru niðurfelt í samgonguskjalið um ætlanir eru at taka fleiri pedagoglesandi inn í skúlan beinanvegin, soleiðis at børn undir skúlaaldri fáa eitt fakligt tilboð, serliga tá hugsað verður um, at tað í Føroyum í dag resta umleið 500 pedagogar fyri at treytirnar í verandi dagstovnalóg verða uppfyltar.

Tankarnar um at raðfesta útbúgving hongur ikki saman, tá tað ikki verður nevnt í samgonguskjalinum, at fleiri námsfrøðingar/pedagogar skulu útbúgvast, serliga tá hugsað verður um hvussu stóran tørv samfelagið hevur á námsfrøðingum og hvussu stórur áhugin er í Føroyum fyri at ogna sær hesa útbúgving, og tískil undrar tað okkum almikið, at hetta ikki er fest í samgonguskjalið.

Felagið vil minna á, at góðir dagstovnar eisini eru ein fortreyt fyri at børnini fáa eitt gott menningar-og útbúgvingarstøði.

Ein stórur trupulleiki í samfelagnum – sum eisini var væl lýst undir valstríðnum – eru júst kvinnurnar, ið fara av landinum at nema sær útbúgving og ikki koma aftur til Føroyar aftaná lokna útbúgving.

Felagið bjóðar seg fram sum samstarvspartur í hesum arbeiði.

# Ov lítil tign í journalistunum um Sandoyartunnilin

SÓLVIT SIMONSEN



Tað er "grúviligt" at hoyra, bæði í sjónvarpi og útvarpi, hvussu teir neyð niðurspyrja um Sandoyartunnilin. Verður ein politikari spurdur, so er tað Sandoyartunnilin. Løgmaður hevur svarað, at allar lógir skulu haldast, og álíkavæl kemur Útvarpið ídag, trettanda við, at onki er avgjørt um tunnilin. Álvaratos - er tað ikki enn siva inn hjá tykkum journalistum í Útvarp Føroya!!!.- At 23 framskygdar sálir stemmaðu fyri einari løgtingslóg, ið sigur, at Sandoyartunnilin skal byrja 1. november 2009. Tey sum ikki atkvøddu ella atkvøddu ímóti – tað fer væl, at vera teirra afturhaldni – at tey ikki tora at trúgva upp á framtíðina í Føroyum.

Tað tykist mær løgi, at vit skulu blíva roknaði út í pengum pr. høvd – hvat vit kosta. Taka vit eina oyggj í landinum; Kallsoyggin. Har eru fýra tunlar og frálík ferjulega, og har búgva einans 120 fólk. – Men tað skal so avgjørt verá teimum væl unt! Hvussu langt síðani er tað ikki, síðani oyggjar í vakra landi okkara blivu saman bundnar við Borðoynna. Bæði Viðoyggin og Kunoyggin, og allir tunlarnir har norðri, og hvussu nógvir tunlar hava ikki bundið landið saman runt um í Føroyum, ja enntá farnir framvið okkum og suður til Suðuroyar, meðan vit liggja við vandafullum vegum og ikki hava fingið inn í eyga.

- Men tað haldi eg, ongin er í iva um, at vit hava øll her í oynni goldið okkara ríkiliga part, men tað gera vit fegin, tí vit vilja øllum landsmonnum okkara alt tað besta.

- Tí vil eg siga við fjølmiðlarnar, at tað er ikki neyðugt við meira tosi um Sandoyartunnilin. Nú er at finna eina skilagóða fígging. Løgtingslógin sigur greitt, at hann skal byrja 1. november 2009 og harvið verður tað. Annars vil eg ynskja nýggja Løgtinginum og Landsstýrinum alt tað besta og eina hepna hond at stýra landi okkara.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá ið kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Borghild Signy Eliasen**
Fuglafjørður

andaðist og varð jarðað.

Tøkk til tykkum, sum vóru um hana ta seinastu tíðina.
Tøkk til tykkum øll, ið hjálptu til við jarðarferðina.
Tøkk fyri blómur, kransar og heilsanir.
Tøkk øll tit mongu, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Arnfríð, Marita, Mona Birita og Ólavur**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá kæra kona, mamma, vermamma og omma okkara

**Elinborg Feilberg**

so brádliga doyði og varð jarðað.

Takk til familju, vinir og kenningar, sum vitjaðu og vóru um okkum við kærleika og umsorgan.
Takk fyri góð og troystarrík orð.
Takk til prest, kirkjutænarar, berarar, sangarar og gravarar.
Takk til tykkum, sum bakaðu og góvu til ervið.
Eisini ein stór tøkk til tykkum, sum hjálptu til við ervinum.
Takk fyri blómur, kransar, heilsanir, uppringingar og øll tit mongu, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Debes, Maria, Jóhanna og Hákun**

## Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu, tá mín kæri maður, pápi, verpápi og abbi

**Jaspur Jespersen**
Tvøroyri

doyði og varð jarðaður.

Tøkk til heimarøktina, kommunulæknar og starvsfólkið á Suðuroyar Sjúkrahúsi, prest, kirkjutænara, sangarar og gravara.
Takk fyri blómur, kransar og peningagávur til kirkjuna.
Tøkk til tykkum, sum gjørdu til ervið.
Tøkk til tykkum mongu, sum fylgdu honum til tað seinasta hvíldarstað her á fold.

Vælsigna nýggjár til tykkum øll.

*Familjunnar vegna*
**Poula, Andreas, Magnus, Valborg, Fríðgerð og Helgi**